# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Har rótin rann

Sum øll munu vita, so byrjaði Sosialurin at koma út tann 24. mai 1927 sum málgagn hjá tí ungu føroysku javnaðarrørsluni. Blaðið sá sostatt dagsins ljós í einum heilt øðrum samfelag í eini heilt aðrari tíð. Búskaparlig kreppa, vinnuloysi, lágar lønir og hýrur hjá teimum, sum vóru í vinnu, vánalig heilsu- og almannaviðurskifti eyðkendu hetta samfelag. Hetta var eitt samfelag, sum at kalla ongar møguleikar hevði at bjóða teimum ungu, sum ikki tóku ábyrgd av øllum sínum borgarum og sum var ljósár frá dagsins vælferðarsamfelag. Blaðið varð sostatt til í einum tilafturskomnum samfelag eyðkent av sosialum órættvísi og sera stórum stættamuni. Tað var tí mestsum sjálvsagt, at nýggja blaðið gjørdist heitur talsmaður hjá tí kúgaðu, undirløntu og illa á holdum komnu verkamannafjøldini, teimum gomlu og øllum teimum mongu á stættasamfelagsins skuggasíðu.




Fyri fyrstu ferð í Føroya søgu varð ljós í almenna rúminum varpað á annað enn togan millum samband og sjálvstýri. Hetta var í sjálvum sær ein stór broyting, og gomul fólk minnast enn, hvussu tað kendist, at fram var komið málgagn, sum talaði søk tí fjaldu fjøldini. Fram til tann dagin blaðið kom vóru almennu Føroyar og ikki minst almenna Danmark blind og deyv mótvegis tí neyð og tí vesaldómi, sum eyðkendi gerandisdagin hjá stóra meirilutanum av Føroya fólki. Týdningur blaðsins í hesum høpi kann valla yvirmetast – Føroya Sosialdemokratur setti orð á stættastríðið og dróg alt tað fram í ljósið, sum var dult og fjalt og skapti eitt orðaskifti um samfelagsspurningar, sum var medvirkandi til grundleggjandi at broyta Føroyar.

Tað var í hesum jørðildi, at rótin rann, og rætt skal vera – tann ungi Tingakrossur hevði havt nakað av tí sama – hetta at reka ein sosialt kritiskan journalistikk, men hesin formur vardi stutt og hvarv í og við, at Krossur gjørdist málgagn hjá tí alt meira konservativa Sjálvstýrisflokkinum. Føroyar eru í dag eitt norðurlendskt vælferðarsamfelag, og landið er millum heimsins ríkastu lond. Stættastríðið verður ikki longur rikið í blaðteigum, men á heilt øðrum vígvøllum. Frá at vera politiskt málgagn er blaðið nú vónandi vorðið eitt nútímans privat public service málgagn. Innihaldið er grundleggjandi broytt, og blaðið er ikki longur boðberi fyri ávísan politiskan boðskap.

Verður sæð burtur frá politiska boðskapinum, sum ikki longur er uppgáva blaðsins, so hevur tað virðisgrundarlag, sum er støði undir blaðstjórnarligu kósini, framvegis røtur aftur til tað progressiva blað, sum kom út á fyrsta sinni fyri áttati árum síðani.

Hetta merkir, at blaðið við støði í skrivi- og talufrælsinum skal at reka óheftan og álítandi tíðindaflutning og annað kunningarvirksemi. Í tíðarinnar anda fevnir uppgáva okkara eisini um at reka og menna eitt fjølmiðlahús, sum umframt blaðútgávu og tiltøk, eisini fer at fevna um aðrar miðlar. Vit hava sostatt sett okkum nøkur mál og arbeiða dagliga við at tilevna tær strategiir, sum skulu føra okkum fram móti hesum málum. Vit venda støðugt eygunum móti framtíðini og fara at gera okkara ítarsta fyri at skapa eina avís, sum kann nøkta tørv lesarans, vinnulívsins og samfelagsins í einum altjóðagjørdum Føroyum. Hetta er ein ómetaliga stór uppgáva, tí kunningartreymurin er øgiligur, og hann fer bert at økjast í hvørjum. Henda støða leggur eina sera stóra ábyrgd á allar fjølmiðlar í framtíðini, og vit fara at leggja alla orku í at liva upp til hesa ábyrgd.

Vit fara at reka okkara miðlavirksemi á fólkaræðislig grundsjónarmið. Við støði í lønandi og sunnum rakstri fara vit at stuðla menningina av samfelagnum á ein slíkan hátt, at vit eru við til at hetta styrkja rættarsamfelagið, fólkaræðið, samhaldsfestið, tolsemi og virðing millum menniskju. Hetta ber væl til samstundis sum vit fara halda okkum til óheftan, kritiskan og álítandi tíðindaflutning, sum líkur hægstu etisku journalistisku krøv. Vit fara at leggja okkum eftir breitt, kritiskt, sakligt og fjølbroytt at umrøða og viðgera allar hugsandi spurningar í føroyska samfelagnum, og í tann mun tað er gjørligt í heiminum uttan um okkum. Vit fara úti sum heima at leggja dent á mannarættindi og virðing fyri øllum menniskjum uttan mun til átrúnað ella húðalit. Vit fara at leggja dent á kunning um og umrøðu av mentan og list, á viðurskifti hjá børnum og ungum og øllum, sum eru í vanda fyri at gerast marginaliserað í okkara samfelag.

Okkara journalistikkur skal vera trúverdugur, væl dokumenteraður, sakligur og kritiskur og skal endurgeva, hvat fyriferst í samfelagnum og halda seg kritiskt til øll mál. Øll sjónarmið skulu, við vanligum fyriliti fyri etisku journalistisku krøvunum, fáa pláss í blaðnum, tó við teirri treyt, at innsent tilfar undir dulnevni framvegis ikki verður tikið upp.

Vit fara sostatt framvegis at eggja til tað sakliga samfelagsorðaskifti, sum er ein meginfortreytin fyri fólkaræðinum. Hesi eru tey virði og tey mál, ið vit hava sett okkum á áttiáradegnum. Tey eru alment humanistisk og demokratisk og hava sostatt røtur í teimum hugsjónum, sum stovnararnir brendu fyri í einum heilt øðrum samfelag við heilt øðrum trupulleikum enn vit kenna frá dagsins samfelag.

Við lesarans hjálp og í góðari samvinnu við okkara samstarvspartar, okkara viðskiftafólk og fyritøkur vænta vit at røkka hesum málum í eini framtíð við spennandi avbjóðingum og markleysum møguleikum.

**Sosialurin**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$



**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.